# Kjak



**Poul Michelsen**
*formaður Framsókn*

## So avgjørt vert at royna

Eg síggi, at tað er ymiskar meiningar um, hvussu gagnligt tað er, at halda lív í einari minnilutastjórn.

Tað eru tey, sum halda, at tað ræður um, at fáa eitt val her og nú. Grundgevingarnar fyri hesum eru ymiskar. Fyri Framsókn er tað bara eitt val, sum kann geva okkum størri ávirkan og møguleikan at broyta førda politikkin.

Tað hevur ongantíð verið ein minnilutastjórn í Føroyum áður, og tí er hetta ein spennandi roynd í sær sjálvum. Men sæð í mun til tey týðandi mál, ið landsstýri ikki megnaði at loysa saman við Fólkaflokkinum, so er tað alneyðugt, at onkur tekur ábyrgd av, at fáa hesi frá hondini - áðrenn val verður útskrivað.

Hetta hevur Framsókn valt at gera. Vit kundi valt at hugsa taktiskt eins og onkur annar og læti ruðuleikan bara ment seg til kaos. Møguliga høvdu vit tá staðið betri til eitt komandi valstríði, men Framsókn er komin í politikk fyri at samstarva. At samstarva tvørtur um siðabundin politisk mørk og fyri at arbeiða pragmatiskt.

Samfelagið krevur stórar umskipanir á næstan øllum økjum. Framsókn torir at fremja hesar – tí spurningurin er ikki longur um hvar ein býr í Føroym, men um yvirhøvur at búgva í Føroyum.

Saman við Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum og Tjóðveldi hava vit gjørt eina langtíðaravtalu um, hvussu týðandi partar av framtíðar fiskivinnupolitikki okkara skal síggja út.

Onnur stórmál, sum Framsókn vil gera langtíðarsemju um - áðrenn eitt val - eru :

- Pensjónsmálið
- Skúlaumskipanin
- Kommunuumskipanin
- Stjórnarskipan Føroya

Ein politisk virkin tíð liggur fyri framman, og Framsókn vil fegin brúka alla summarfrítíðina uppá at loysa tey mál sum liggja í tinginum. Tað krevur gott hegni, men læt okkum so finna neyðuga hegnið fram.

Tá so arbeiðsdagurin er lokin kann løgmaður skriva val út t.d. í september.



**Zakarias Wang**

## Rættur málsins

Hvønn rætt hevur føroyska málið í Føroyum?

Fara vit í lóggávuna, so stendur í heimastýrislógini, at føroyskt er høvuðsmálið. Harumframt stendur, at danskt skal lærast væl og virðiliga.

Tað er skyldan hjá myndugleikunum at síggja til, at henda lóg eins og aðrar lógir verður hildin.

Er tí nakað til hindurs fyri, at myndugleikarnir samtykkja, at allar frálærubøkur í føroysku skúlunum eru á høvuðsmálinum, eisini tær bøkur, sum næmingarnir skulu læra fremmanda málið danskt eftir? Valla man tað vera.

Reglan í skúlunum er, at næmingar og lærarar í felag velja lærubøkur. Um so er, at ein lærari heldur, at tær føroysku bøkur, sum tá eru á marknaðinum, ikki eru nóg góðar, so kann hann bara gera eina bók, sum hann heldur vera betri. Bókaútgáva gerst støðugt bíligari. Er henda nýggja bókin so góð, at aðrir næmingar og lærarar taka undir við henni, fer hesin lærararithøvundur at fáa eina fitta eykainntøku av tiltaki sínum.

Ein slík lóg hevði framt kreativitetin í øllum samfelagnum, so hví ikki royna at fáa hana setta í verk?



**Hanus Samró**
*formaður í HUXA og valevni hjá Fólkaflokkinum*

## ALS er nýggja arbeiðararørslan

Fyri einum ári síðani kom forsprákari frá arbeiðararørsluni yvir til mín. Viðkomandi hevði hildið røðu á Vaglinum, men eingin var møttur upp. Hann mintist afturá sjeyti árini, tá ið altjóða arbeiðaradagurin var alfa og omega. Irriteraður inn á vánaligu undirtøkuna spurdi hann: hvat er hent við arbeiðaranum? Við virðing fyri viðkomandi segði eg einki, men eg loyvi mær at siga tað í dag. Altjóða arbeiðaradagurin hoyrir heima í søgubókunum. Tað er ein leivd av eini farnari tíð. Viðurskiftini hjá vanliga arbeiðaranum eru góð, og tað eru eldsálum sum áður nevnda at takka.

### ALS

Samfelagið hevur 1. mei 2011 eina aðra avbjóðing: hvussu fáa vit fólk at arbeiða? ALS, ið skuldi vera trygdarnet, er vorðin ein trupulleiki. Ung verða eggjaði at fara uppí, tey hoyra søgur um javnaldrar, ið fara ókeypis til Costa Del Sol. Tey skulu bara fylla ALS-skjalið út, so er túrurin heima. Hetta eyðkennir hugsanarháttin hjá fleiri. Samfelagið er komið í eina støðu, har tað ikki loysir seg at arbeiða, tí borgarin er vorðin ov vanur við ymisku tænasturnar, ið "vælferðar"samfelagið veitir.

### Arbeiðarin

Bróðurparturin av lønini fer í skatt. Ein fimtingur av kostnaðinum fer í MVG. Tað er skiljandi, at arbeiðarin krevur okkurt fyri pengarnar, men er hann nøgdur við, at rúsdrekkamisnýtarar og onnur fáa pengar fyri einki? Ynskir arbeiðarin, at ungdómurin sólar sær í summarsteðginum, tá ið hann arbeiðir yvir?

### Forsprákarin

Hevði eg møtt forsprákaranum aftur, og hann spurdi, hvat er hent við arbeiðaranum, vildi eg svarað:

- Vit mugu gera tað minni freistandi at fara upp í ALS. Vit rinda ov nógv fyri rúsdrekkamisnýtarar og tann reyvasíða ungdómin, ið ikki orkar at arbeiða, og um vit nakrantíð skulu fáa fólk út at arbeiða, mugu vit vísa teimum virðing. Arbeiði skal verða stoltleikin, tað skal umboða teirra dygd og dirvi. Ikki fyrr enn lívið í ALS verður súrt, verður altjóða arbeiðaradagurin framhaldandi ein dagur, ið eingin skoytir um, tí ALS er nýggja arbeiðararørslan.



**Bogi Andreasen**
*varaborgarstjóri, form. í byggi- og býarskipanarnevndini*

## Ongin fótbóltsvøllur í Dalinum Langa

Í seinastuni hevur alment kjak verið millum Levi Mørk og Jákup Sìmun Simonsen, býráðslimir í Havn, um staðseting av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík.

Akkurát hvat teir eru ósamdir um, er helst torført hjá vanliga borgaranum at skilja, tí teir eru púra samdir um høvuðsmálið, sum er at leggja nýggjan fótbóltsvøll í Hoyvík í fríøkinum í Dalinum Langa.

Sum formaður í byggi.- og býarskipanarnevnd Tórshavnar býráðs kann eg bara leggja aftrat hesum kjakinum, at hetta als ikki kemur uppá tal.

Tað verður ongin fótbóltsvøllur lagdur í Dalinum Langa, og býráðslimir áttu heldur at nýtt orkuna uppá at funnið alternativ til verandi ætlan, um teir ikki eru nøgdir við hana.

Eg skal ikki siga, hvar besta staðið annars kann vera. Men hvørki Levi Mørk ella nakar annar sleppur at eyðræna náttúruna í Hoyvík, soleiðis sum mælt verður til.

Tað er rætt, at málið fekk umrøðu í byggi- og býarskipanarnevndini, har sligið varð fast, at hetta ikki var ideella loysnin. Plandeildin staðfesti frammanundan, at Dalurin Langi als ikki var egnaður til ein fótbóltsvøll og tí, sum hartil hoyrir.

Fyri tað fyrsta er ikki pláss til ein tílíkan vøll í Dalinum Langa, sum kemur at liggja kloss upp í Myllutjørn. Hartil verður inntrivið í náttúruna alt ov stórt og vit oyða eitt fríøki, vit heldur áttu at brúkt næstu tvey-trý árini til at planta og gjørt til eina viðalund til gleði fyri allar borgarar.

Ein fótbóltsvøllur er ikki bara ein fótbóltsvøllur. Her skal til- og frákomuvegur gerast, parkeringsøki til fleiri hundrað bilar, ljóssteyrar, sum stinga nógvar metrar upp í loft, umframt áskoðarapláss til hóp av fólki. Fremja vit hetta verður dalurin aldrin aftur opin sum fríøki fyri hoyvíkingar og aðrar havnaborgarar.

So brúkið heldur orkuna uppá at finna annað alternativ, um tað er neyðugt. Vøllurin er longu staðsettur við skúlan við Løgmannabreyt, men hetta kjakið førir bara við sær, at málið blívur við at draga út.

Annars standi eg púra spyrjandi, hví Levi Mørk ikki tekur mál sum hetta upp í byggi- og býarskipanarnevndini ella í býráðssamgonguni, ístaðin fyri at viðgera tað í fjølmiðlunum.